FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

8. mars 2024
Mál: 24/04794-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-096/2023

**Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-096/2023 frá Árna Skaale, løgtingsmanni, til Dennis Holm, landsstýrismann, um fiskiskapin á Føroyabanka í 2023**

**Spurningar:**

1. Hvussu royndist skipanin, tá hugsað verður um fleksibilitet og gagnnýtslu av samlaða talinum av tillutaðum døgum í teimum trimum bólkunum, sum fingu loyvi at veiða á Føroyabanka í 2023?
2. Hvørjir bátar, greinað á bólkar, veiddu á Føroybanka í 2023?
3. Hvussu stórt var veiðivirðið hjá hvørjum einstøkum bólki sær?
4. Hvussu er miðalvirðið pr. veiðidag hjá hvørjum bólki sær?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Í 2023 varð skipanin við fiskiskapinum eftir botnfiski á Føroyabanka broytt. Útróðrarbátar í bólki 4 og í bólki 5 fingu lutfalsliga fleiri dagar, og línuskip lutfalsliga færri dagar enn í 2022. Ein onnur broyting var, at línuskip bara kundu fara á Bankan eftir hálvan august.

Nýggj skipan varð gjørd fyri útróðrarbátarnar undir 15 tons. Í 2023 sluppu bara teir vinnuliga virknastu bátarnir á Bankan. Harafturat varð skipanin broytt soleiðis, at bátarnir høvdu felags fiskidagar, men varð eitt hámark sett fyri hvønn bátin.

Eins og í 2022 vórðu fiskidagarnir í bólki 3 og í bólki 4 býttir út á fiskifør eftir talinum av veiðiloyvum í hvørjum bólki og tillutaðir sum egnir fiskidagar.

Talva 1 niðanfyri vísir fiskidagatal ásett í kunngerð og brúktir fiskidagar á Føroyabanka í 2023. Viðmerkjast skal, at sambært sjófeingislógini verður daganýtslan hjá fiskiførum í bólki 3 og í bólki 4 roknað frá tí, fiskifarið fer úr havn, til fiskifarið er komið aftur í havn. Fyri bátar í bólki 5 telur hvør túrur ein fiskidag, hóast túrurin er longri enn 24 tímar.

**TALVA 1. Ásett fiskidagatal í kunngerðini fyri Føroyabanka í 2023 og dagabrúk**

| | Ásett dagatal í kunngerð | Brúktir dagar | Dagar eftir |
|---|---|---|---|
| Bólkur 3, línuskip yvir 110 tons | 80,00 | 67,95 | 0,64 |
| Bólkur 4, útróðrarbátar 15-110 tons | 150,00 | 126,42 | 16,37 |
| Bólkur 5, útróðrarbátar undir 15 tons | 100,00 | 98,00 | 2,00 |

kelda: www.vorn.fo

Í bólki 3 vórðu 7,62 fiskidagar avhendir øðrum í bólkinum. Í bólki 4 vórðu 35,7 dagar avhendir øðrum í bólkinum.

## Til spurning 2, 3 og 4

Í talvunum 2, 3 og 4 er yvirlit yvir øll fiskifør, ið veiddu á Føroyabanka í 2023. Talvurnar vísa avreidda nøgd, avreiðingarvirði og miðalvirði fyri hvønn brúktan fiskidag.

**TALVA 2 : Veiðitøl a á Føroyabanka 2023 – línuskip í bólki 3**

| Skip | Sýslunr. | Kalli-bókstavir | Veiðinøgd tilsamans kg | Veiðivirði tilsamans, kr. | Brúktir fiskidagar | Veiðivirði pr. dag, kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| EIVIND | VA0132 | XPQE | 64.473 | 1.999.699 | 7,56 | 264.510 |
| JÓGVAN I | FD0710 | OW2049 | 62.304 | 1.830.609 | 7,57 | 241.824 |
| KAMBUR | FD0454 | OW2115 | 75.621 | 2.188.334 | 7,49 | 292.167 |
| KVIKK | KG0477 | OW2426 | 38.142 | 1.029.177 | 5,09 | 202.196 |
| NÚPUR | KG0910 | XPZB | 75.827 | 1.919.112 | 6,85 | 280.162 |
| PISON | KG0476 | OW2132 | 47.823 | 1.426.997 | 6,67 | 213.943 |
| POLARSTJØRNAN | KG0349 | OW2319 | 97.380 | 3.240.681 | 11,79 | 274.867 |
| SANDSHAVIÐ | SA0499 | XPRK | 47.386 | 1.490.990 | 3,78 | 394.442 |
| STAPIN | FD0032 | OW2065 | 23.989 | 868.928 | 3,80 | 228.665 |
| VESTURHAVIÐ | VN0700 | OW2009 | 50.755 | 1.365.870 | 7,34 | 186.086 |
| **Samantalt** | | | **583.700** | **17.360.397** | **67,9** | **255.525** |

kelda: www.vorn.fo

**TALVA 3 : Veiðitøl á Føroyabanka 2023 – útróðrarbátar 15-110 tons í bólki 4**

| Skip | Sýslunr. | Kalli-bókstavir | Veiðinøgd tilsamans kg | Veiðivirði tilsamans, kr. | Brúktir fiskidagar | Veiðivirði pr. dag, kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| ANRU | KG0730 | XPSI | 184.742 | 4.184.572 | 32,05 | 130.564 |
| BARIÐ | VA0444 | OW2418 | 35.424 | 964.885 | 8,74 | 110.399 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BRAGD | KG0642 | OW2262 | 41.114 | 689.123 | 7,88 | 87.452 |
| BRANDUR | KG0557 | OW2198 | 56.002 | 1.094.800 | 9,38 | 116.716 |
| FISKIVARÐI | VN0659 | OW2366 | 64.122 | 1.248.571 | 10,98 | 113.713 |
| KALLANES | FD0590 | OW2027 | 8.506 | 210.189 | 6,31 | 33.310 |
| LÍÐHAMAR | KG0602 | XPTR | 80.745 | 1.527.308 | 18,94 | 80.639 |
| MORGUNROÐIN | TN0919 | OW2025 | 3.963 | 110.985 | 4,19 | 26.488 |
| NORÐSØKI | KG0538 | XPUF | 75.996 | 2.002.109 | 14,61 | 137.037 |
| TORVANES | FD0052 | OW2008 | 6.354 | 92.228 | 1,71 | 53.935 |
| VOLUNTEER | FD0387 | OW2279 | 78.416 | 1.617.962 | 11,64 | 139.000 |
| **Samantalt** | | | **635.384** | **13.742.732** | **126,4** | **108.698** |

kelda: www.vorn.fo

**TALVA 4 : Veiðitøl á Føroyabanka 2023 – útróðrarbátar undir 15 tons í bólki 5**

| Skip | Sýslunr. | Kalli-bókstavir | Veiðinøgd tilsamans kg | Veiðivirði tilsamans, kr. | Brúktir fiskidagar | Veiðivirði pr. dag, kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BJØRGVIN | KG0503 | OW2210 | 25.855 | 671.418 | 6 | 111.903 |
| DALSENNI | KG0301 | XPF2196 | 41.476 | 878.928 | 7 | 125.561 |
| ELIN JÓHANNA | FD0263 | XPWH | 37.377 | 823.597 | 7 | 117.657 |
| ELLINOR | FD0037 | OW2321 | 16.411 | 325.718 | 7 | 46.531 |
| FAGRAENNI | KG0398 | XPUP | 18.231 | 274.186 | 3 | 91.395 |
| FALKURIN | FD0660 | OW2482 | 52.755 | 1.156.238 | 7 | 165.177 |
| GORDRÚGVIN | FD0359 | OW2114 | 45.352 | 861.863 | 7 | 123.123 |
| LILJA | VA0072 | XPYR | 29.606 | 769.341 | 7 | 109.906 |
| LÍRABERG | TN0213 | XPXU | 50.850 | 1.164.103 | 7 | 166.300 |
| LUTTUR | FD1171 | XPRN | 23.071 | 447.215 | 5 | 89.443 |
| PETUR M. | TG0552 | XPSY | 24.924 | 690.752 | 7 | 98.679 |
| STAKKAVÍK | KG0748 | OW2095 | 20.989 | 546.340 | 7 | 78.049 |
| STELLA | TN0056 | OW2342 | 41.469 | 898.647 | 7 | 128.378 |
| SVANUR | TG0576 | XPUI | 38.620 | 1.028.701 | 7 | 146.957 |
| TRÓSTUR | FD0094 | XPZM | 32.019 | 655.122 | 7 | 93.589 |
| **Samantalt** | | | **499.005** | **11.192.169** | **98** | **114.206** |

kelda: www.vorn.fo

**Dennis Holm**
*landsstýrismaður*